# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hevur Tórshavnar Kommuna einki lært?

Eingin kommuna í landinum hevur gjørt so nógvar fermetrar av havnaøki, sum ikki kunnu brúkast, sum Tórshavnar Kommuna. Vit minnast havnabyggingina á Sundi, har mesta økið framvegis stendur óbrúkt eini 20 ár aftaná. Vit minnast sokallaðu “Nyhavnina” uttanfyri gamla molan í Havnini, sum illa kann brúkast til atløgupláss.

Man skuldi trúð, at Tórshavnar Kommuna hevði lært okkurt av hesum útbyggingum, men tað tykist ikki vera tilfeldið. Tórshavnar Kommuna hevur nú ætlanir um at gera eina stóra bingjuhavn á Oyrareingjum, sum man vera eitt tað vindharðasta plássið í landinum. Tað er fleiri ferð komið fyri, at 40 fóts bingjur eru foknar á sjógv í Kollafirði, seinastu ferð í fjør.

Bingjuhavnin skal eftir ætlan gerast á gamla ídnaðarøkinum á Oyrareingjum, ið stendur tómt, tí at Tórshavnar Kommuna hevur hildið tað tómt seinastu árini.

Kommunan hevur blokerað virkjum frá at koma á hetta økið í áravís, hóast økið hevur staðið sum vinnuøki í byggisamtyktini. Virki hava søkt um at sleppa á økið, men hava fingið nei. Tórshavnar Kommuna hevur við vilja latið økið staðið tómt inntil kommunan hevur fingið broytt byggisamtyktina fyri at gera tað til havnaøki. Tómt er kanska í so nógv sagt, eftirsum órudd og burturkast hevur ligið á økinum til stóran ampa hjá bygdarfólki og til umhvørvisskomm hjá Tórshavnar Kommunu, hóast eitt lyfti frá borgarstjóranum um at rudda økið seinasta summar.

At leggja eina bingjuhavn innast í einum fjørði nærendis sethús, bendir á ein hugburð um betong og asfalt, sum ikki hoyrir nútíðini til. At man bygdi havnir í bygdum øki i 1950’unum merkir ikki, at tað er rætt at gera tað nú. Umhvørvismedvitið hjá einari kommunu, sum ber seg soleiðis at í 2007, kann ikki verða stórt. Tað er ikki uttan grund, at man vanliga leggur bingjuhavnir og tungan ídnað uttanfyri bygt øki, har man kann.

Hvussu við umhvørviskanningum? Hvussu við árinskanningum? Havnaarbeiðið á Oyrareingjum kann ikki verða byrjað, tí so hevur tað verið í stríð við byggisamtyktina. Fer arbeiðið í gond nú, so má ein umhvørvislig árinskanning væl saktans gerast í tráð við nýggju føroysku havumhvørvislóggávuna frá 2005? Flokkarnir, sum mynda býráðssamgonguna, hava ein umhvørvispolitikk, og tað forpliktar! Fylgja teir ikki hesum, so váttar tað bert tann fordómin um Tórshavnar Býrað, at talan ikki er um flokkar, men bert um einstaklingar, sum ikki so mikið sum kvetta í stevnuskráir.

Landsplanlegging er eftir øllum at døma eitt banniorð í Føroyum. Eitt tabuevni. Hví kunnu kommunur ikki samstarva fyri landsins besta og fyri at spara dupultíløgur og oyðan av umhvørvi og náttúru! Hví ikki gera Runavík til bingjuhavn. Har eru fortreytirnar longu til steðar.

Føroyar verður meir og meir samanbundið. Klaksvík hevur bygt eina stóra og góða havn í Ánunum, har landfast er til meginøkið, og Runavíkar Havn hevur stór øki til taks. Um ein tunnil kemur til Skálafjørðin, so verður skjótari at koyra úr miðbýnum í Havn inn til Runavíkar, enn til Kollafjarðar. Hóast hetta, so tykist Tórshavnar Kommuna geva okkum eitt studium í lokalpolitikki og ósamstarvsvilja, tá hann er ringastur, og byggja eina bingjuhavn afturat í hesum lítla landi. Hevur Tórshavnar Kommuna einki lært?

**Sosialurin**

## Stuðlar Sosialurin deyðarevsing?

HELGI ABRAHAMSEN



“Deyðarevsing livir enn í Sambandsflokkinum”, skrivar Sosialurin í yvirskrift seinasta leygardag, og vísir við løgnum grundgevingum millum annað til skemtiteigin á heimasíðu Sambandsfloksins. Men hvat vísir Sosialurin við sínum skemtitekningum?

Tíðin ímillum jól og nýggjár er ofta svanglig hjá fjølmiðlunum. Tað hendir lítið í samfelagnum hesa ársins tíð, og tí er ringt at finna tilfar til spennandi yvirskriftir. Hetta endar ofta við, at bløðini eru tær beru yvirskriftir, meðan sjálvar greinarnar hava lítið uppá seg.

**Sadam bjargaði forsíðuni**

Avrættingin av Sadam Hussein var tí ein sannur fongur fyri tíðindablaðið Sosialin. Forsíðan var bjargað. Nú ráddi bara um at halda málinum í kóki.

Eg skal ikki blanda meg uppí alt tað, sum er sagt og skrivað um hetta málið. Skal bara, áðrenn eg sigi nakað meira, sláa fast við sjey tumma seymi, at eg taki ikki undir við deyðarevsing.

**Vilstur blaðmaður**

Tað sum fær meg at gera hesa viðmerking, er greinin í Sosialinum leygardagin, har yvirskriftin var “Deyðarevsing livir enn í Sambandsflokkinum”.

Eg veit ikki hvussu nógv innlit, blaðmaðurin ið skrivaði greinina hevur í føroyskan politikk, men sum tað framgongur av greinini, so hevur hann verið inni á heimasíðuni hjá Sambandsflokkinum og leitað eftir upplýsingum um støðu floksins til deyðarevsing. Av øllum tí rúgvismikla tilfari, sum henda heimasíða hevur at bjóða, velur blaðmaðurin at vitja skemtisíðuna, fyri síðani at brúka hana sum eitt slag av “prógvi”. Hetta er eitt løgið val, sum sigur meira um blaðmannin enn um Sambandsflokkin.

Endamálið við skemtisíðuni er at lýsa ymiskar hendinga í samfelagnum við einum skálkabrosi, og talan er tí ikki um nakað politiskt manifest.

**Broytir týdningin**

Blaðmaðurin finnur á skemtisíðuni eina viðmerking, sum undirritaði skrivaði 3. januar í sambandi við eina grein hjá Tórbirni Jacobsen.

Tórbjørn skrivaði í nevndu greinini um deyðarevsing, men hann var ikki serliga heppin í sínum orðavali, og millum annað kom hann til at siga, at størsti trupulleikin við martýrum er, at hvørki riflukúlur, øks ella gálgi bíta á teimum.

Hetta er skilaleys tala, tí hvat skal ein maður, sum sigur seg vera ímóti deyðarevsing, brúka riflukúlur, øks og gálga til?

Tað var hetta, eg gjørdi viðmerking til á skemtisíðuni. Viðmerkingin var sostatt IKKI ein viðmerking um deyðarevsing, men bert um skilaleysu skrivingina hjá Tórbirni Jacobsen. Men blaðmaðurin brúkar hetta sum “prógv” fyri, at “deyðarevsing livir enn í Sambandsflokkinum.”

**Sosialurin hevur eisini ein skemtiteig**

Nú er tað ikki bara heimasíðan hjá Sambandsflokkinum, ið hevur ein skemtiteig. Sosialurin hevur í nógv ár havt sín skemtiteig á baksíðuni, har dugnaligi teknarin Óli P. ger skemtiligar viðmerkingar til dagsins aktuellu støðu. Hann hevði millum annað í farnu viku eina tekning av avrættingini í Irak, har beinini á Sadam sóust dingla niður úr gálganum. Og tað eru ikki bara bølmenni ið enda sínar dagar á baksíðuni á Sosialinum. Føroyskir politikarar verða javnan bæði hongdir, skotnir og hálshøgdir á hesi síðuni, meðan vanliga fólkið verður tveitt útav Trælanýpuni.

So um eg skal døma Sosialin eftir somu forskriftum sum blaðmaðurin dømir heimasíðu Sambandsfloksins, so kann dómurin ikki vera annar enn, at Sosialurin stuðlar deyðarevsing – eisini í Føroyum.

## Sambandsmenn fagnaðu deyðarevsing

EIRIKUR LINDENSKOV
blaðstjóri



Helgi Abrahamsen vísir í lesarabrævi oman fyri til grein í Sosialinum fríggjadagin, undir yvirskrivtini: »Deyðarevsing livir enn í Sambandsflokkinum«. Hann nevnir kortini ikki essensin í greinini, sum er, at formaðurin í Norðoya Sambandsfelag alment sigur, at vit í Vesturheiminum ikki skulu siga irakiska fólkinum, hvussu tey skulu skipa sína rættvísisuppgerð við fortíðina – les avrættingina av Saddam Hussein.

Hetta kemur í kjalarvørrinum av, at formaður Sambandsfloksins bæði á tingsins røðarapalli 8. november og á Portalinum/ í Sosialinum um nýggjárshalguna hevur sagt, at deyðadómurin av Saddam Hussein var »ótrúliga positivur«. Hesi orðini tók hann kortini aftur – men sigur nú, at »rættvísi sigraði«, hvussu tað so skal skiljast.

At Helgi Abrahamsen, sum er skrivari Sambandsfloksins, ikki heldur, at hetta hevur nógv upp á seg og leggur Sosialinum undir at gera eina gølu burtur úr hesum, má bara standa fyri hansara rokning. Men tað er so ein veruleiki, at formaður Sambandsfloksins og formaðurin í Norðoya Sambandsfelag – hóast teir siga seg vera ímóti deyðarevsing, hava fagnað deyðadóminum av Saddam Hussein. Um tað er at skapa eina gølu, at ein fjølmiðil setir spurnartekin við slíkar útmeldingar, so hava vit kanska ikki somu uppfatan av mannarættindum, av politiskum støðufesti og av fólkaræði sum heild.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.